Landssjúkrahúsið

**Fylgiskjal – Vekting**

Yvirskipað vekting millum bólkarnar:

1. Fruktkassar til starvsfólk og sjúklingar 40 %
2. Frukt og grønmeti til køkin 60 %

Stig verða givin í mun til, hvussu veitari livir upp til krøvini í tilboðstilfarinum soleiðis:

**Fruktkassar:**

| | | |
|---|---|---|
| Prísur fyri lítlan kassa | 10-20 stig | 20 stig til lægsta prísin |
| Prísur fyri miðal kassa | 25-35 stig | 35 stig til lægsta prísin |
| Prísur fyri stóran kassa | 40-50 stig | 50 stig til lægsta prísin. |

Um prísur er eins, fáa tilboðini sama stigatal.
Tá umroknað verður til stig, verður lægsti prísur settur til 100%, og prosentvísa frávikið verður drigið frá stigunum. Tá er 1% sama sum 1 stig. Tó verður ikki farið niður um lægstu stigini. Tað vil siga, at mest møgulig stig fyri prísin á kassunum er 105 stig, meðan í minsta lagi 75 stig verða latin fyri prísáseting.

Dømini við fruktmiksi verða vektað við 10 til 50 stig eins og prísirnir omanfyri.

Kassarnir, sum verða brúktir, vekta 10 stig fyri papp-kassar og 20 stig fyri plastkassar.

At enda verður javnað fyri góðskusortering og vektklassa. Javningin fer fram soleiðis, at ein lág góðskusortering og / ella ein lágur vektklassi ávirka stigini fyri prísin. Talan verður um bonusstig, har høgur vektklassi og høg góðska gevur har bonusstig, í mesta lagi 10 stig fyri hvørt økið, ella í alt 20 stig.

**Køksveitingar:**

Veitingar til køkin er fyri bæði frukt og grønmeti.

Í skjalinum verður biðið um, at upplýsa vørunummar og keyps eind. Síðani eindar prís (tilboðsprísur ella listaprísur). Í kolonnu "I" skal samlaða upphæddin upplýsast (Keypt nøgd kolonna "C" * Eindar prísur kolonna "G") og samlaði prísurin verður funnin. Síðani er ein kolonna til at upplýsa góðskusortering og vektklassa, og at enda er ein kolonna til viðmerkingar – til dømis um talan er um eina minstunøgd.

Lægsti prísur fær 100 stig og hægri prísurin í minsta lagi 60 stig alt eftir lutfallinum millum hægsta og lægsta prís. Sí eisini útrokning omanfyri galdandi fyri prísfrávik og stigafrádrátt. Sama framferð er eisini fyri bonusstig vegna góðskusortering og vektklassa.

Stig verða givin soleiðis fyri prísjavningar í mun til árstíðina:

| | |
|---|---|
| Vikulig prísjavning | 30 stig |
| Mðr. prísjavning | 20 stig |
| Ársfj. prísjavning | 10 stig |

Grundgevingin fyri at lata hesi stigini er, at regluligar prísjavningar geva LS møguleika at optimera innkeyp og tryggja fjølbroytt vøruúrval.

Bíleggingarskipanin er tí eisini týdningarmikil. Ein fleksibel teldutøk bíleggingarskipan við røttum prísum gevur tí 25 stig. Aðrar loysnir fáa 10 stig.

Ein samandráttur við vekting og stigum er settur upp niðanfyri.

**Stigayvirlit**

| **Fruktkassar (40%)** | **Stig** | **Køkur (60%)** | **Stig** |
|---|---|---|---|
| Prísur | 75-105 | Prísur | 60-100 |
| Góðska – bonus | Max 10 | Góðska – bonus | Max 10 |
| Vektklassi | Max 10 | Vektklassi | Max 10 |
| Dømi um kassar, frágreiðing | 10-50 | Frágreiðing um árstíðir og kalkulatiónshátt | 10-30 |
| Pakningur | 10-20 | Bíleggingarskipan | 10-25 |